

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 08 - 2013

# Uppsagnir í Dong ávirka ikki leiting í Føroyum

Danska orkufelagið, DONG Energy, sum eitt nú er ein týðandi partur av føroysku oljuleitingini, hevur aftur í hyggju at siga fleiri hundrað fólkum upp. Tað ljóðar, at 400 uppsagnir eru á veg. Hetta upplýsir felagið í sambandi við roknskapin fyri fyrra hálvár. Felagið hevur gjørt greitt, at tað við hesum uppsagnum ynskir at betra um sítt kappingarføri. Komandi uppsagnirnar fara at minka um útreiðslurnar við 300 mill. kr. um árið. Seinast Dong segði upp 300 fólkum var í november í fjør. Uppsagnirnar fara ikki at ávirka leitivirksemið hjá DONG á Atlantsmótinum, tvs. vestan fyri Hetland og Føroyar. Sum skilst verður talan um uppsagnir innan vindmylnudeildina og termiska partin av virkseminum. Í dag arbeiða 6.600 fólk hjá Dong Energy.

